Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo



# Óroynd songkvinna tók øll á bóli

**Um vikuskifti var REX karmur um sera góðan tónleik, og leygarkvøldið trein ein ung kvinna á pallin og tók øll á bóli. Planet var á staðnum.**

Eyðun Nolsøe var saman við øðrum dugnaligum tónleikarum á pallinum í REX um vikuskifti, og sum vanligt var rómurin góður, og teir væl umtóktu tónleikararnir vístu enn einaferð sínar dygdir. Tað óvanliga við hesum leygarkvøldinum var, at á miðjari nátt trein ein ung kvinna á pallin, og sýndi síni kynstur sum songkvinna.
Bert 17 ára gomul var Lív Jákupsdóttir Ryggshamar á palli saman við Eyðun Nolsøe, og framførdi hon lagið hjá Jeff Buckley, Halleluja. Dansurin nærmast steðgaði upp, og forvitni byrjaði at fylla salin, meðan fólk hugsaðu um hvør tann ungan songkvinnan var. Óroynd á palli megnaði unga kvinnan at framføra torføra lagið meistaraliga, og hóast hennara unga aldur var tónleikurin í hásæti frá byrjan til enda.
- Eg haldi tað var so fantastiskt at sleppa at spæla saman við Eyðun. Hann er ótrúliga dugnaligur, og tí var tað ein uppliving fyri lívið, sigur Lív.
Spurd um hvussu tað var at framføra fyri fyrstu ferð, sigur Lív soleiðis.
- Longu í fyrsta ørindinum bleiv eg ótrúliga rørd, og hugsaði fyri mær sjálvari, at hetta vil eg gera restina av lívinum. Eg lyfti bara armarnir upp, og nýtti hvørt sekund av lagnum, sigur hon.
Lív er enn ikki limur í nøkrum tónleika bólki, men hevur ætlanir um at stovna sín egna bólk.
- Eg og ein vinkona hava ætlanir um at stovnað ein bólk, men eg veit ikki júst nær, sigur Lív við Planet
Spennandi verður at síggja um Lív ætlar sær at halda fram við tónleikinum. Undir øllum umstøðum vantar henni ikki førleikar sum songkvinna.



# G!: The Haunted á festival

**G! avdúkar nýggj nøvn alla vikuna, og í dag er greitt, at svenski heavy metal bólkurin The Haunted fara at framføra til ársins G! Festival**

- Illir, svenskir menn við hvítum tonnum og longum, sløttum hári, sum hava stoypt sær eitt trummusett, og sum buka basstaktir á stálveirar. Soleiðis sigur Jón Tyril um teir útlendsku gestirnir

Tað verður øgiligur málmur tá The Haunted standa á palli í julimyrkrinum í Gøtu í summar.
Í gjár var kunngjørt at Spleen United og Veto koma við sínum heiðurslønum úr Danmark – og úr Svøríki koma The Haunted við Swedish Metal heiðursløn í kuffertinum. Besta metal útgáva í Svøríki í fjør var "Versus" hjá The Haunted.

- Sviarnir verða mettir at duga tað, føroysku metal-vinirnir leingist mest eftir longu vetrarkvøldini – at gera sínar egnu útgávur til hámar skuggar, tá teir standa á palli. Aggressiónir stýrdar við harðari hond. Skjótt og hart, spælt við ísakøldum neyvleika, sigur Jón Tyril.

Svenski bólkurin The Haunted er ikki nakar nýggjur ókendur bólkur á altjóða tónleikapallinum. Teir hava framført saman síðan 1996. Anders og Jonas Björler, sum eru beiggjar, og Adrian Erlandsson spældu í bólkinum At the Gates, sum var millum slóðararnar á svenska Heavy Metal pallinum.

- Serliga seinnu árini hava The Haunted fingið løn fyri stríðið, og fyri at tora at víðka um hugtøkini. Teir spæla trash, ja, men teir hava eisini melodiskar síður. Teir eru harðir, men eisini melankolskir, sigur Jón.

The Haunted hava givið út seks fløgur, tann seinasta "Versus" er tann fyribils best umtókta.
The Haunted hava spælt óteljandi konsertir, serliga í Evropa, USA og Japan, og í summar koma teir til Gøtu.

**G! avdúkar føroyskir bólkar**
Í dag avdúkar G! Festivalurin eisini, at SIC, ið júst hava víðka um virksemi sítt, og í næstum fara á sera umfatandi Evropa túr, vera millum annað í Gøtu í summar.

Bólkurin, sum var nógv úti um seg í 2008, Boys In A Band, ið hava altjóða fløguútgávu fyri framman í ár, fara at spæla undir Støðlafjalli í ár.

The Ghost, ið hava fingið plátusáttmála í Onglandi og sum í januar mánaði í ár hava havt týðandi framførslur á bæði Eurosonic og Midem, verða við á G! skránni.

Higartil eru hesi nøvn almannakunngjørd sum partar av skránni hjá G! 2009

VETO (DK)
SPLEEN UNITED (DK)
THE HAUNTED (SE)
BOYS IN A BAND
SIC
THE GHOST